NATA
North Atlantic Tourism Association

# Stuðulsskipanir hjá NATA

North Atlantic Tourism Association (NATA) hevur sum mál at menna og marknaðarføra ferðavinnuna í teimum trimum londunum í Útnorðri, Grønlandi, Íslandi og Føroyum. NATA bjóðar nú áhugaðum at søkja um stuðul.

Gjørdar eru tvær stuðulsskipanir:

1. verkætlanir innan menning av ferðavinnuni og marknaðarføring.
2. stuðul til ferðing millum londini, t.d. til skúlaflokkar, ítróttarbólkar og mentanarligar skiftisferðir.

**Stuðul til verkætlanir innan menning og marknaðarføring av ferðavinnu**

Einstaklingar, virkir og felagsskapir í teimum trimum londunum kunnu søkja um fíggjarligan stuðul til verkætlanir, sum hava til endamál, at menna og/ella marknaðarføra ferðavinnuna. Treytin er, at partar í minst tveimum av teimum trimum londunum aktivt luttaka í og samstarva um verkætlanina. Stuðul kann verða veittur til verkætlanir, sum liggja innanfyri fylgjandi karmar:

- Samstarv um marknaðarføring
- Nýskapan og vørumenning
- Kunningarferðir millum ferðavinnuvirkir – umskifti av royndum og vitan
- Góðsku- og umhvørvismenning innan ferðavinnu

Veitt kann verða 50% í stuðli, tó í mesta lagi kr. 100.000 til eina verkætlan. Stuðul verður ikki veittur til egið arbeiði ella ráðgevarar.

Umsóknirnar verða mettar eftir hesum viðurskiftum:

- Verkætlanarhugskoti og góðsku í umsóknini. Umsóknir, sum eru ófullfíggjaðar, verða ikki viðgjørdar.
- Nýskapanin í verkætlanini
- Marknaðarførings viðurskifti
- Fíggjarætlan og fíggingarætlan
- Samfelagsligt gagn og burðardyggleiki

**Stuðul til ferðing millum Útnorðurlondini**

Eitt av endamálunum við NATA avtaluni er at fremja møguleikarnar fyri ferðing og mentanarligum umskifti millum tey trý londini í Útnorðri. Stuðul eftir hesi skipanini verður bert latin til ferðaútreiðslur millum londini, tvs. ikki til gisting og aðrar dagligar útreiðslur. Mesti stuðul, ið latin verður, er 25% av ferðaútreiðslunum, ella kr. 1.000 til ferðing millum Ísland og ávikavist Føroyar ella Grønland og kr. 2.000 til ferðir millum Føroyar og Grønland.

Ferðastuðul verður latin til:

- Skúlaflokkar
- Ítróttarfeløg
- Tónleikabólkar
- Onnur mentanarsamstørv

Umsóknirnar verða mettar eftir hesum viðurskiftum:

- Verkætlanarhugskoti og góðsku í umsóknini. Umsóknir, sum eru ófullfíggjaðar, verða ikki viðgjørdar.
- Endamál við ferðini
- Sínamillum samstarv
- Væntaða úrtøkan av ferðini
- Fíggjarætlan og fíggingarætlan

**Umsóknarblað á donskum og enskum kunnu heintast her:**

- verkætlanir innan menning og marknaðarføring av ferðavinnu (word) danskt enskt
- ferðing millum Útnorðurlondini (word) danskt enskt

Umsóknin, sum skal vera skrivað undir at øllum pørtum í verkætlanini, skal sendast í teldutøkum líki til mette@industry.fo.

**Umsóknarfreist**

Umsóknarfreistin er mánadagin 13. februar 2012. Umsóknir, sum eru móttiknar eftir hendan dag, verða ikki viðgjørdar.

Umsøkjarar fáa svar í seinasta lagi fríggjadagin 30. mars 2012

**NATA**
c/o Vinnuhúsið
Smærugøta 9A
Postsmoga 1038
FO-110 Tórshavn
Telefon 30 99 14
mette@industry.fo